# Samgonguskjalið 1998

---

| Samgonguskjal dagfest 9. mai 1998 millum Fólkaflokkin, Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkin |
|---|

Politiski setningurin:
Fólkaflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin eru samdir um at skipa politiska samgongu á løgtingi og at skipa landsstýri.

**1. Ríkisrættarliga støðan**
*Samgongan staðfestir:*
* at føroyingar eru tjóð og Føroyar eitt land, og at politikkur samgongunnar verður at fremja henda suverenitet í verki

*Samgongan er samd um:* Uppskot verður lagt fyri løgtingið og samtykt í 1998, sum skal fremja henda suverenitet í verki og skal staðfesta:
* at løgtingið hevur heimild at gera sáttmála við donsku stjórnina um ríkisrættarligu støðuna, og at tingið hevur heimild til at siga sáttmálan upp.
* at tað bert er gjøgnum sín demokratiska umboðsstovn, Føroya Løgting, at Føroya fólk kann seta eina grundlóg í gildi fyri Føroyar.

*Samgongan fremur hesi stig:*
**I.** Farið verður undir samráðingar við donsku stjórnina í tingsetuni 1998 um føroysk-donsk viðurskifti við tí endamáli, at Føroyar verða sjálvstøðugar (suverenar). Føroyskur heimarættur verður staðfestur frá 1. januar 1999. Ein sáttmáli verður gjørdur, sum leggur fast framtíðar samstarvið millum Føroyar og Danmark í útbúgvingar-, heilsu-, uttanríkis- og rættarmálum. Málsøki eiga at kunna útdelegerast til danska ríkið at umsita og sáttmálin kann umfata felags kongshús, felags gjaldoyra og felags skyldur og rættindi hjá føroyskum og donskum ríkisborgarum búsitandi hjá hvørjum øðrum, men føroyingar verða frítiknir fyri herskyldu. Tá ið sáttmálin millum Føroyar og Danmark er gjørdur og samtyktur á Føroya Løgtingi, verður hann lagdur til fólkaatkvøðu.

**II.** Føroya løgting samtykkir í komandi tingsetu (1998) lóg um at seta grundlógarnevnd, íð skal gera uppskot til føroyska grundlóg. Tá grundlógin er samtykt á løgtingi, fer hon til fólkaatkvøðu í seinasta lagið ár 2000.

**III.** Farið verður undir at fáa øll málsøki undir føroyskt lóggávu- og umsitingarvald. Arbeitt verður fyri, at danski Tjóðbankin eins og Fíggjareftirlitið hava fráboðanarskyldu

til Føroya landsstýri viðvíkjandi føroysku peningastovnunum.

**2. Búskaparligir og fíggjarligir karmar**
Fíggjarliga og búskaparliga verður gjørt upp við Danmark, har støða verður tikin til, hvussu uttanlandsskuld verður afturgoldin og heildarveitingin kann minkast burtur eitt ávíst áramál, samstundis sum avtala verður gjørd millum donsku stjórnina og landsstýrið um eina varliga fíggjar- og búskaparliga tillaging.

**3. Bankamálið**
Bankamálið og kravið um endurgjald fyri keypið av gamla Føroya Banka verður avgreitt sambært tilmælunum hjá serfrøðingunum til landsstýrið.

**4. Fíggjar- og búskaparmál**
Grundstøðið undir búskapinum er framleiðsluvirðið í landinum. Politiska endamálið við fíggjarpolitikkinum er
* at geva øllum borgarum javnbjóðis møguleikar
* at vælferðin hjá føroyingum verður ment
* at samfelagnum verður tryggjað eitt sunt støði fyri sjálvsmenning og búskaparligum sjálvbjargni
* at javnvág verður millum privat og alment fyritakssemi og íløgur

Rikin verður ein varin og ábyrgdarfullur búskaparpolitikkur.

Miðað verður eftir at linka skatta- og avgjaldstrýstið á húsarhald og framleiðslu, so at kappingarføri vinnulívsins batnar og megnar at bera landsins felags húsarhaldi.

**4. Skatta- og tollmál**
Skattalóggávan skal ikki darva virkishugin, men skal eggja til vinnuligt fyritakssemi. Arbeiðið fram móti einari bruttoskattaskipan heldur fram. Málið er ein so høg skattafrí grundarupphædd sum møguligt og so lágt skattatrýst sum møguligt. Lagt skal vera upp fyri, at láginntøkur og barnaríkar familjur verða ikki fyri vanbýti.
Hjún, har annað hevur alla inntøkuna, verða at javnstilla við hjún, har bæði hava inntøku.
Grundarupphæddin í fólkapensjónini verður skattafrí.
Meirvirðisgjaldsskipanin verður framhaldandi endurskoðað, so heimaídnaðurin og tænastuvinnan verða styrkt.

**5. Almenna fyrisitingin**
Til tess at tryggja eina vælvirkandi almenna fyrisiting og almennar stovnar, má bygnaðurin endurskoðast og rationaliserast, so hann gerst lutfalsliga bíligari og kemur í betri javnvág við vinnuliga sektorin.
Fyrisitingarliga lógarverkið verður endurskoðað, so umsitingin av øllum málsøkjum verður einfaldari og lagað til tørvin í føroyska samfelagnum.

Í samsvari við arbeiðið við nýggjum kommunubygnaði, verða partar av almenna sektorinum lagdir nærri borgarunum, har hetta umsitingarliga ber til.

**6. Vinnuligir karmar**

Vinnulívspolitikkurin verður at leggja í tryggar karmar, so vinnulívið fær umstøður at mennast til at bera føroyska samfelagið. Landsstýrið orðar ein greiðan vinnupolitikk og ger langtíðarætlanir í samráði við vinnufeløg, ráðgevingarstovnar og fíggingarstovnar.

Tað almenna skal reka ein haldgóðan búskapar-, fíggjar-, skatta-, menningar- og umhvørvispolitikk. Útbúgving, gransking, samferðsla og samskifti, veiðiavtalur við onnur lond og marknaðaratgongd skulu lagast eftir hesum málssetningi. Innan hesar karmar skal vinnan mennast á marknaðarbúskaparligum burðardyggum grundarlagi.

*6.1 Fiskivinnupolitikkur:*

Lóg um endurnýggjan fiskiflotans - herundir útróðrarflotan - verður sett í gildi. Ein greiður fiskivinnupolitikkur verður orðaður, eisini fyri menning av fiskiídnaðinum á landi og marknaðaratgongd.

Dentur verður lagdur á økismenning, arbeiðsumhvørvi, góðskukrøv og hagreiðingarskipanir.

Færøernes Realkreditintitut verður yvirtikið.

Virkað verður fyri at stovna eitt útflutningsráð.

Fiskastovnarnir undir Føroyum skulu gagnnýtast skynsamt sum varandi grundarlag undir føroyska búskapinum. Teir stovnar, ið flotin hevur atgongd til, skulu gagnnýtast við neyðugum varsemi eftir tilmæltum fiskidøgum og kvotum, so teir geva sum mest íkast til búskapin. Fiskastovnum, sum eru ovurveiddir, verða veittir møguleikar at menna seg. Hildið verður fast við økisfriðingarpolitikkin. Stødd og røtt samanseting av veiðiflotanum má lagast eftir hesum møguleikum og verður best tryggjað við, at fiskidagar og kvotur verða so umsetilig sum gjørligt. Undantikin er tó útróðrarflotin undir 15 tons.

Arbeitt verður fyri, at meiri fiskur verður virkaður í Føroyum.

*6.2 Aðrar vinnur*

Ein langtíðarpolitikkur verður orðaður fyri ferðavinnu, landbúnað, heimaídnað og menning av nýggjum vinnum við serligum atliti at kunningartøkni.

Lógirnar um telduskráir verða dagførdar.

Almennur stuðul skal bert veitast sum tíðaravmarkaður ígongdsetarastuðul/íløgustuðul

við greiðum almennum krøvum og reglum fyri nýtsluna.

Lóg um broyting í FAS-skipanini má fáa gildi skjótast.

Skipasýnið verður yvirtikið.

Landbúnaðurin skal styrkjast við tí høvuðsendamáli, at Føroyar gerast mest møguligt sjálvbjargnar við landbúnaðarvørum. Virkast skal fyri, at øll landbúnaðarjørð verður gagnnýtt. Jarðarlóggávan verður endurskoðað, so hon gagnar smærru plássunum, og umstøðurnar hjá festibóndum verða greiðari.

*6.3 Útjaðarin*
Besta grundarlagið undir samfelagnum er virksemi og trivnaður á øllum plássum í landinum. Útjaðarin er í eini serligari støðu. Samgongan er samd um, at neyðugt er at fremja verulig tiltøk, um útoyggjum og smáplássum skal vera lív lagað.

*6.4 Framtaksgrunnur*
Viðtøkurnar fyri Framtaksgrunnin verða endurskoðaðar við tí endamáli, at grunnurin í størri mun skal menna nýggjar vinnur og fremja økismenning eftir handilsligum fortreytum.

*6.5 Føroyar og ES*
Nýggj samstarvsavtala skal gerast við ES, sum tryggjar samstarv og marknaðaratgongd, men heldur fast við fult ræði á náttúrutilfeinginum á sjógvi, landi og í undirgrundini. Viðurskiftini við ES byggja á løgtingssamtyktina frá 1974, sum sigur, at Føroyar skulu standa uttan fyri ES.

Stig skulu takast til at menna marknaðarsamstarv millum Føroyar, Grønland, Ísland, Noreg og Russland til tess at standa sterkari mótvegis ES-marknaðinum.

**7. Arbeiðsmarknaðarmál**
At minka um arbeiðsloysið verður skattatrýstið lækkað, so tað loysir seg betur at arbeiða, og betri lønsemi kemur í vinnuna.
Í samráði við partarnar á arbeiðsmarknaðinum verður hildið fram við arbeiðnum at gera eina skipan, sum kann loysa trætur á arbeiðsmarknaðinum so skjótt, tær koma í.
Lóggáva um arbeiðsumhvørvi verður endurskoðað saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

**8. Familjumál**
Familjan er kjarnin í samfelagnum.

Kannað verður, í hvønn mun ansingarstuðul kann fylgja barninum.

Spurningurin er barnaansing kring landið verður tikin upp.

Virkað verður fyri, at parttíðar starv verður vanligari á arbeiðsmarknaðinum.

Virkað verður fyri, at barnsburðargrunnur verður settur á stovn fyri allar partar á arbeiðsmarknaðinum.

Barnafrádrátturin í landsskattinum verður hækkaður. Bøtt verður um fíggjarliga, har annar forsyrgjarin fellur frá.

Arbeitt verður fyri at avmarka talið á fosturtøkum við betri ráðgeving.

Rikin verður ein rúsevnispolitikkur, sum hevur til endamáls at fyribyrgja og minka um rúsevnismisnýtsluna.

**9. Almanna- og heilsumál**
Føroysk almannalóggáva skal lagast til føroyskan tørv og føroysk viðurskifti við serligum atliti til nýggjan kommunubygnað. Endamálið er, at avgerðirnar og málsviðgerin skulu takast so nær borgarunum sum gjørligt.
Trupulleikarnir á barnagarðs- og røktarheimsøkinum skulu loysast í samstarvi millum land og kommunur.

Heilsverkið krevur íløgur og menning. Ein greiður heilsupolitikkur verður orðaður við tí endamáli at bøta um fyribyrgjandi heilsurøktina og at skapa trygg viðurskifti innan heilsurøktina. Ein raðfesting verður gjørd fyri íløgurnar á sjúkrahúsøkinum. Heimarøktarskipanin verður skipað sum døgnrøktartænasta. Samstarvið við Ríkissjúkrahúsið o. a. heilsustovnar í grannalondunum verður betur samskipað. Landssjúkrahúsið og Klaksvíkar Sjúkrahús verða útbygd sum ætlað.

Pensiónsøkið er afturútsiglt og verður tikið til viðgerar. Endamálið er, at øllum verður veitt ein trygg og rættvís eftirløn. Nevndin, sum er sett at kanna pensiónsøkið, ger arbeiði sítt liðugt og úrslitið verður viðgjørt í samgonguni og neyðug stig framd.

Arbeiðsloysið er framvegis stórt kring landið. Arbeitt verður við tiltøkum, so sum aktiveringsætlanum, útbúgvingarmøguleikum o. ø. til tess at forða fyri varandi arbeiðsloysi.

Ein greiður íbúðarpolitikkur verður raðfestur. Alternativir íbúðarmøguleikar skulu skapast kring landið í samstarvi millum landið og kommunurnar, bæði sum kommunalar/privatar leiguíbúðir, lutafelagsíbúðir, eldraíbúðir, íbúðir til rørslu- og menningartarnað, ungdómsíbúðir o. a.

Umstøðurnar hjá rørslu- og menningartarnaðum skulu betrast við eini ætlan fyri at

menna bústaðar-, starvs-, frítíðar- og samferðslumøguleikar og tryggja tey grundleggjandi korini í øllum samfelagsviðurskiftum.

**10. Mentan og útbúgving**
Útbúgvingin av ungdóminum má byggja á kristna, føroyska mentan. Gjørd verður ætlan fyri útbúgvingarverkið við atliti til framtíðar útbúgvingar, samskipanir og rationaliseringar.

Fólkaskúlin, miðnáms- og tær hægru útbúgvingarnar skulu styrkjast at fylgja tøkniligu samskiftismenningini.

Møguleiki skal vera fyri frí- og eftirskúlum.

Føroyar eiga at mennast í altjóða granskingar- og útbúgvingarhøpi. Vinnuskúlarnir verða styrktir til nýggjar avbjóðingar: Innan marknaðarføring, innan tekniska økið og innan lærugreinir, sum eru neyðugar í komandi oljuvinnuni.

Lógin um lestrarstuðul verður dagførd. Førdur verður ein útbúgvingarpolitikkur, sum eggjar ungdómi at nema sær útbúgving eisini uttan fyri Norðurlond.

Ein greiður mentanarpolitikkur verður orðaður við støði m. ø. mentanarálitinum, og byrgt eigur at verða upp fyri harðskapi og siðspillu.

Á fjølmiðlaøkinum eigur føroyska tilfarið at styrkjast.

**11. Umhvørvismál**
Umhvørvispolitikkurin verður styrktur. Meginreglan skal vera, at burturbeining og umhvørvisvernd áliggur tí dálkandi partinum.

Upplýsing og tiltøk til náttúru- og umhvørvisvernd verða framd.

Føroyar skulu í altjóða høpi stríðast móti dálking frá stóru ídnaðarøkjunum á meginlandinum.

Brennievni, sum hava minsta skaðiliga árinið á umhvørvið, fáa framíhjárætt við lægri avgjaldi.

Umhvørvis- og matvørulógin verða endurskoðaðar.

**12. Samferðslu- og samskiftismál**
Landsstýrið hevur skyldu at tryggja hóskandi ferða- og flutningssamband millum tey ymsu plássini í Føroyum. Samgongan ásannar, at ferða- og flutningssamband hevur alstóran týdning fyri vinnumøguleikar og trivna í landinum.

Raðfesting av íløgum á samferðsluøkinum verður framd sambært fíggjar- og búskaparorku landsins. Hildið verður fast við íløguætlan at seta 20 mió. kr. um árið í grunn til fast samband um Vestmannasund næstu fýra árini. Grunnurin fær heimild at upptaka lán og krevja inn bummpening. Kanningar í sambandi við farleiðina um Leirvíksfjørð halda fram. Arbeiðið at byggja nýtt skip til Sandoynna verður gjørt. Samferðslan við Suðuroynna verður dagførd beinanvegin. Eisini verður loftvegis sambandið við flogfari kannað.

Støða teirra rørslutarnaðu verður havd í huga, tá ið nýíløgur/ábøtur í samferðsluskipanini verða gjørdar.

Kannað verður, um rationaliseringar kunnu gerast í samferðslukervinum. Uppgávur kunnu bjóðast út til privatar at røkja, har hetta gevur fíggjarligan og tænastuligan fyrimun.

Flutningur av farmi og fólki millum Føroyar og útlond má leggjast í eina trygga legu, sum er nøktandi fyri allar partar.

**13. Kommunumál**
Kommunulóggávan verður nútímansgjørd. Kommunala sjálvsræðið og ábyrgdin skulu styrkjast við greiðari skilnaði millum lands- og kommunuuppgávur. Í hesum sambandi verður ætlanin fyri miðfyrisitingina endurskoðað við tí endamáli at flyta tænastuna nærri borgaranum.

**14. Oljuvinna**
Landsstýrið ger uppskot til, hvussu møguligar inntøkur av ráevnum í undirgrundini skulu umsitast og brúkast. Aðalmálið er, at ein møgulig komandi oljuinntøka til landskassan ikki avlagar búskapin.

Tryggjast skal, at eitt komandi leitingarumfar og ein møgulig oljuvinna, fyrst og fremst verður grundarlagið undir at menna førleikan í føroysku vinnuni í altjóða høpi, so hon kann tillaga seg broytingar og menna nýggjar inntøkumøguleikar.

Spurningurin um almennar íløgur í sambandi við oljuvinnu verður tikin upp og viðgjørdur millum landsstýrið og kommunur.

Strongt verður á til tess at finna eina samráðingarloysn á marknatrætuni við Bretland um undirgrundarmarkið skjótast gjørligt.

**15. Uttanlandssamstarv**
Arbeitt verður fyri, at Føroyar fáa sjálvstøðuga umboðan í ST. Politiskt, handilsligt, vinnuligt og mentanarligt samstarv verður styrkt við onnur lond við serligum denti á

samstarv við aðrar smátjóðir. Føroyar fáa sjálvstøðuga umboðan í Norðurlandaráðnum. Økt samstarv um at umsita felagstilfeingi í Norðuratlantshavi skal fáast í lag millum Føroyar, Grønland, Ísland, Noreg og Russland, sambært løgtingssamtykt 1996.

Tórshavn, 9. mai 1998

Undirskrivað av Anfinni Kallsberg úr Fólkaflokkinum, Helenu Dam á Neystabø úr Sjálvstýrisflokkinum og Heina O. Heinesen úr Tjóðveldisflokkinum